# Løgmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 29.02.2024 |
| Mál nr.: | 23/15208-14 |
| Málsviðgjørt: | EM |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð um P-tøl

Við heimild í § 3, stk. 6, í løgtingslóg nr. 41 frá 8. mai 2007 um fólkayvirlit, sum broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2011 og løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður ásett:

**§ 1.** P-tal er stytting fyri persóntal og verður brúkt av myndugleikunum til at eyðmerkja hvønn einstakan borgara.
*Stk. 2.* P-talið er samansett av níggju tølum. Seks tey fyrstu tølini eru føðingardagur, føðingarmánaður og føðingarár. Trý tey síðstu tølini er eitt raðtal, har síðsta talið er ólíkatal hjá monnum og líkatal hjá kvinnum. Síðsta talið er samstundis eitt eftirlitstal, sum eftir modulus-11-háttinum er prógv um, at talan er um eitt p-tal.

**§ 2.** Almennir myndugleikar kunnu geva persónum, sum ikki lúka treytirnar í § 3, stk. 1, í løgtingslógini, eitt p-tal, sum verður nýtt í virkseminum hjá viðkomandi.
*Stk. 2.* Stk. 1 er somuleiðis galdandi fyri privatar løgfrøðiligar persónar, sum við lóg eru álagdir at brúka p-tøl, tó so at hetta krevur loyvi frá Løgmálaráðnum.
*Stk. 3.* Almennir myndugleikar og privatir løgfrøðiligir persónar, sum eru nevnd í stk. 1 og 2, og sum eru skrásetingarmyndugleiki, skráseta p-talið í Landsfólkayvirlitið sambært § 4 í løgtingslógini.
*Stk. 4.* Skrásetingarmyndugleikin kann eftir avtalu við Løgmálaráðið útveita umsitingina av p-tølum og útflýggjan av p-tølum til løgfrøðiligar persónar, ið eru skrásettir og staðsettir í Føroyum.

**§ 3.** Ein og hvør, sum fær eitt p-tal sambært hesi kunngerð, skal frammanundan fyri skrásetingarmyndugleikanum vísa nøktandi samleikaprógv og tað skjalprógv, sum skrásetingarmyndugleikin biður um.
*Stk. 2.* Ein skrásetingarmyndugleiki, sum skrásetir eitt p-tal í Landsfólkayvirlitið hjá persóni, sum ikki lýkur treytirnar í § 3, stk. 1 í løgtinglógini, skal frammanundan eftirkanna samleikan hjá viðkomandi. Hetta kann eitt nú verða gjørt við at vísa pass ella koyrikort ella avrit av hesum.
*Stk. 3.* Skrásetingarmyndugleikin kann krevja, at viðkomandi møtir persónliga,

um tað verður mett neyðugt í sambandi við eftirkanningina av samleikanum.

**§ 4.** Skrásetingarmyndugleikin skal
1) gera mannagongdir fyri og áseta einsháttaði minstukrøv í sambandi við eftirkanningina av samleikanum,
2) tryggja, at starvsfólk hava nøktandi útbúgving og førleika at eftirkanna samleika hjá fólki,
3) hava eftirlit við, hvussu eftirkanningin verður framd, og
4) skrivliga upprætta skjalprógv fyri, at myndugleikin heldur treytirnar í nr. 1-3.

**§ 5.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Løgmálaráðið, 29. februar 2024

**Bjarni Kárason Petersen**
landsstýrismaður

/ Nella Festirstein